Skrivligur fyrispurningur

eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Johan Dahl, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Politiska avgerðin um uppsetan av eftirlitsradara

Spurningar:

1. Nær fer landsstýrismaðurin at taka endaligu politisku avgerðina um at loyva donskum myndugleikum at seta upp ein eftirlitsradara í Føroyum?

Viðmerkingar:

Tað er í longri tíð farin fram ein drúgv politisk viðgerð av umbønini frá donskum myndugleikum um loyvi at seta upp ein eftirlitsradara í Føroyum.

Málið tók seg upp fyrst í 2021 og er viðgjørt síðan líka fram til í dag, hóast málið eftir ætlan skuldi verið avgreitt longu í seinnu helvt av 2021.

Tað, sum í løtuni er óheppið er, at málið tykist at vera blivið meira ella minni ein politisk kastibløka, og óvissa valdar um, hvat veruliga hendir í hesum málinum.

Tað er landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, sum skal taka endaligu politisku avgerðina, eftir ráðførslu við Uttanlandsnevndina hjá Løgtinginum, og boða donskum myndugleikum frá henni.

Radaramálið hevur stóran almennan týdning fyri og áhuga millum føroyingar. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 11. mars 2022

Johan Dahl